# Skemt

## Góður til summarið




Vit síggja javnan bilar, sum verða settir til sølu. Ja, teir verða settir við alfaraveg, so vit øll kunnu síggja, at bilarnir eru til sølu. Nú ein dagin komu vit fram á eitt heldur øðrvísi akfar, sum stóð til sølu. Ikki hvønn dag at møta einum gaffiltrucki á hendan hátt. Men hann kundi nú verið hentur í summar. Kanska sum ein opin sportbilur. Kanska til at flyta mat og drykkjuvørur til grillveitslur. Møguleikarnir eru óavmarkaðir!


Sosialurin
kudagur 11. mai 2011 Nr. 54 85. árg. kr. 20,00
HÓTTI GRANNAKONU VIÐ KVÍVI
DRAMATIKKUR Í OYNDARFIRÐI
...hótti ein 62 ára gamal maður í fyllskapi granna- ... at hann skuldi drepa ...
Stríð um manntal... s10-11
Fótbólt... B36 ve... oddas... á Toft... ítr s22
s8

## Hvat er ein kvívur?

Sosialurin brúkar stórar stavir á forsíðuni. Tað ræður um at gera vart við góðu søgurnar. Men onkuntíð standa vit øll spyrjandi. Sum til dømis í farnu viku, tá ið Sosialurin ruddaði forsíðuna við yvirskriftini: *Hótti grannakonu við kvívi.* Hvat í allari víðu verð er ein *kvívur?* Okkurt serligt slag av knívi? Ella kanska bara ein slagvilla?

## Skilda Barbie

Ein maður kemur rennandi inn í ein leikuhandil og sigur, at hann skal brúka eina føðingardagsgávu til dóttirina

– Tú kundi keypt eina Barbie dukku, sigur kvinnan í handlinum

– Ja, lat meg fáa eina.

– Hvørja skalt tú hava? Vit hava veitslu-Barbie fyri 250 krónur, ítróttar-Barbie fyri 275, skúla-Barbie fyri 248, og so hava vit skildu Barbie fyri 3897 krónur.

– Hví kostar tann skilda Barbie so nógv.

– Tí tá fært tú eisini bilin hjá Ken, húsini hjá Ken og helvtina av pengunum hjá Ken við í keypinum.

## Sólferia

Ein kvinna liggur nakin á takinum á gistingarhúsinum og sólar sær, tá ið ein tænari kemur stórleypandi og biður hana lata seg í.

– Hví tað? Fyri tað fyrsta liggi eg á búkinum, fyri tað næsta havi eg handklæði klárt, um nakar kemur upp her, sigur kvinnan.

– Ja og fyri trað triðja liggur tú á glastakinum á matstovuni, svaraði tænarin.

# Í RANGASTRÚPAN

**Nú fór hatta stríðið dekan ov langt!**
Ósemja í Tryggingarfelagnum: Stjórin farin
***Dimma***

**Ruddið forsíðuna!**
Gásapar stolið
***Portal.fo***

**Ja, og?**
Gávukort skulu galda
***Dimma***

**Gomul tíðindi!**
Løgtingið mist sambandið við fólki
***Edmund Joensen í lesarabrævi***

**Tað er bara at fara í kríggj!**
Trý av fimm stuðla nú Obama
***Dimma***

**Hvat merkir tað?**
Ábyrgd avgerð lagnuna
***Dimma***

**Hvat?**
Lava setti hol á stórsigur
***Portal.fo***

**Teir parast!**
Bank Nordic hug á Amagerbankanum
***Dimma***

**Hvat plagar at verða tað næsta?**
Julian Hansen er ikki undir trýsti
***Portal.fo***

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Nevnd aftur og fram

Ein sera góð ábending um, so sera beinrakin, at hon kann ikki misskiljast uttan við vilja, at fólkaræðið virkar, er, at nú fara øll tingmál, sum allar minsti ivi er um, aftur í nevnd. Nevndina, tey júst eru komin úr eftir at hava verið har nógv longur enn tingskipanin loyvir. Við undantaksloyvi úr hægsta staði sjálvandi.

Soleiðis slepst undan, at minnilutin alla tíðina kúgar meirilutan. Tað øvugta, at meirilutin setur seg á minnilutan, er í lagi. Tað er ein hornasteinur í fólkaræðinum.

Men tað er bara so undarliga skipað, at tá ein meiriluti er, fær hann lítið gjørt fyri minnilutum. Og so er eingin meiriluti. Tá ein minniluti ella fleiri fara úr meirilutanum, endar meirilutin eisini sum ein minniluti. Fløkt? Ja, sera fløkt er tann besta stjórnarskipanin, sum tey varnu kalla tann frægasta, og tey ovvarnu tann minst vánaliga.

Aftur í nevnd við hasum.

Lítil logikkur er í demokratii, men tað er sum so heldur einki krav.

Fólkaskúlin hevur næstan líka langa summarferiu sum tey fólkavaldu í fólkaræðinum.

Hjá okkum vanligu deyðiligu er strævið at koma aftur til arbeiðis úr summarferiu, tí so nógv arbeiði bíðar eftir okkum. Løgtingið er so væl skipað, at har dettur alt tað ógjørda burtur, tá summarferian endar. Tey koma aftur til púra slætt borð og fríborð í bæði borð. Arbeiðið, sum ikki var gjørt í seinasta lagi hálvan mai, er ikki til longur síðst í juli.

Mann- og konutalið (og barnatalið minkar) er brot á manna- og konurættindi, tí teljarar við lógini í hondini kunnu bróta seg inn í gongina ella stovuna hjá tær og mær. Hvat so? Amerikanarar brutu seg inn í sovikamarið hjá einari familju í Abdullahbatt í Pakistan, uttan at banka uppá. Ikki fyri at telja fólkið í húskinum, men fyri at skjóta tey og telja líkini aftaná. Eingin spyr um manna- og/ella konurættindi har. Rættindi eru svasshumanisma.

Húsbóndin varð skotin, meðan hann leitaði eftir mannarættindasáttmálanum hjá ST.

Alternativt mann- og konutal, drep fólk fyrst og spyr tey so, um sjúka hevur darvað tey nevnivert í teirra dagliga virki. Og um tey skíta í vanligt vese ella í bukku.

Næstu ferð, tey koma frá SEV og vilja inn í gongina hjá mær og enntá sneyta í einum skápi hjá mær, skal eg hava grundlógina og mannarættindasáttmálan liggjandi klár í gongini.

Hjá okkum fór mann- og konutalið aftur í nevnd. Tí so nógvir ósvaraðir spurningar vóru.

Men ætlanin er framvegis, at 11.november telja vit, hvussu nógvir føroyingar eita Mortan.

Stjórnarskipanin, planur B í grundlógarhøpi, fór eisini aftur í nevnd. Stjórnarskipanin verður ongantíð samtykt. Og hvat so? Vit hava eina frálíka grundlóg. Gamaní sigur hon einki um grindabýti, gásafrælsi og tey óføddu. Men tá danskarar kunnu brúka hana, kunnu vit eisini. Vit plaga at gera sum danskarar gera. Allar okkara lógir eru umsettar úr donskum, so hví ikki umseta donsku grundlógini í staðin fyri at brúka 12 ár afturat til at penta 700 broytingar til eina stjórnarskipan?

Góða ølið fór ikki aftur í nevnd, og tað var sterkur lútur at svølgja hjá nógvum. Nú er bara eftir at loyva fínsprittinum, so kunnu vit fáa okkum eina trýssarakenning aftur: fílur og reint spritt/djolly kola ella Hawaii drim. Tað er drykkur fyri rættar menn, taldir ella ei.

Og eftir fimm ella seks gløs telja vit føroyingar, menn og konur, og koma til, at vit eru 97.178. Og minst líka nógv í Danmark.